Broytingar í Lønarportali

Í samráð frá TAKS, hava føroysku peningastovnarnir gjørt broytingar í Lønarportalinum.

Broytingarnar eru betring av verandi skipan og lutvíst liður í fyrireikingini til pensjónsnýskipanina, ið ætlandi kemur í gildi 1. januar 2014.

Hvat er broytt ?

Broytingarnar umfata:

a) møguleika fyri innlesing av eftirlønarflyting samstundis sum lønarflyting
b) møguleika fyri at innlesa viðmerking á eina lønarflyting

Hetta merkir, at lønarportalurin hevur fingið nýggjar teigar og at lønarútgjaldsfílan, ið verður innlisin í lønarportalin, hevur fingið nýtt format.

Í fyrsta umfari er ikki neyðugt hjá arbeiðsgevarum at tillaga mannagongd ella skipan, tí lønarportalurin loyvir eisini innlesing eftir gamla leistinum.

Seinni í ár verður kortini lokað fyri hesum og tí eiga arbeiðgevararnir í góðari tíð at taka stig til neyðugar tillagingar.

Nýggir teigar í "Lønarportalinum" ?

Høvuðsbroytingin er, at ein eftirløn frameftir ikki skal innlesast sum ein sjálvstøðug lønarflyting, við 0,00 í A-inntøka, men í teigar til endamálið á einstøku lønarflytingini.

Harafturat verður nú eisini møguligt at innlesa eina viðmerking á einstøku lønarflytingina.

Myndin til høgru vísir nýggju innlesingarmyndina, har broytingarnar eru frámerktar við reyðum.



Løn

Teigurin "Viðm. løn" er nýggjur. Her er møguleiki fyri at innlesa ein tekst. Um hesin er innlisin, kemur hesin við sum fráboðanartekstur á lønarbókingini hjá lønmóttakaranum.

Hetta er ætlað upplýsingum um hvat arbeiði ella tíðarskeið lønin er fyri. Arbeiðsgevarin avger sjálvur um hesin ynksir at brúka hesar teigar.

Eftirløn

Í staðin fyri at skráseta eina eftirløn sum vanliga lønarflyting, skulu eftirlønir frameftir innlesast í hesar teigar:

- **Skrás. nr:** Skrásetingarnummar hjá føroyskum peningastovni.
- **Kontunummar:** Eftirlønarkonta í peningastovni ella samlikonta hjá eftirlønarveitara, samsvarandi yvirliti upplýst á heimasíðuni hjá TAKS.
- **Eftirløn upph:** Eftirlønargjaldið – brutto
- **Viðmerking eftirløn:** Viðmerking, ætlað sum kunning frá arbeiðsgevara til eftirlønarveitara, td. polisunr.

Ein eftirlønarflyting kann gerast sjálvstøðugt ella saman við eini løn og/ella frítíðarløn.

Broytingar í lønarútgjaldsfílu.

Broytingar eru eisini gjørdar í formatinum í lønarútgjaldsfíluni.

Í høvuðsheitum hevur byrjunarrecordin (header) fingið ein nýggjan teig, ið inniheldur samlaðu eftirlønaruhæddina, umframt at teigarnir, ið eru umtalaðir omanfyri, eisini eru komir við í fíluna.

Nýggja fíluformatið er at finna undir appendix.

Gamla fíluformatið virkar til 1. desember 2013.

Spurningar

Um arbeiðsgevari hevur spurningar, er hesin vælkomin at seta seg í samband við Elektron á telefon 345200 ella við at senda teldupost til sd@elektron.fo.

Appendix – Recordlayout - Lønarútgjaldfíla

Record longd

Detail recordlongdin er 223. Hvør record endar við CarriageReturn/Linefeed (0D0A).
Samlaða detail record longdin er sostatt 225.

Header record

Tekstur	Longd	Viðmerkingar
Tal av lønum	4	Tal av detail recordum í filuni
Flytingardagfesting	8	Dato fyri nær flytingin av lønini skal fara fram. Format DDMMYYYY
Blank	28	Ikki í nýtslu (skal vera blankt)
A-inntøka íalt	11	Format 99999999.99
Forvunnin upphædd íalt	11	Format 99999999.99
Eftirløn íalt	11	Format 99999999.99 **(Nýtt)**
Frítíðarløn íalt	11	Format 99999999.99

Detail record

Tekstur	Longd	Viðmerkingar
Skrá.nr. arbeiðsgevari	4	Skrá.nr konto hjá arbeiðsgevara
Arbeiðsgevara nr.	9	A-tal
Kontunr. arbeiðsgevari	10	Kontunummar hjá arbeiðsgevara
P-tal	9	P-tal hjá løntakara
Skrá.nr. lønmóttakari	4	Skrásetingarnummar á kontu hjá lønmóttakara
Kontunr. lønmóttakari	10	Kontunummar hjá lønmótakara
Upphædd A-inntøka	11	Format 99999999.99
Upphædd forvunnin løn	11	Format 99999999.99
Skrá.nr fríðtíðarløn	4	Skrásetingarnummar fyri kontu til frítíðarløn
Kontunr. fríðtíðarløn	10	Kontunummar til frítíðarløn
Upphædd Frítíðarløn	11	Format 99999999.99
Navn	32	Navn á lønmóttakara
Lønarslag	3	Slag av løn. Fyribils skal hetta altíð setast til: 000 – A-inntøka **(Nýtt)**
Viðmerking til løn	35	Viðmerkingar viðv. løn **(Nýtt)**
Skrá.nr. eftirløn	4	Skrásetingarnr. Eftirløn **(Nýtt)**
Kontunr. eftirløn	10	Kontunr. eftirløn **(Nýtt)**
Uppædd eftirløn	11	Format 99999999.99 **(Nýtt)**
Viðmerking til eftirløn	35	Viðmerkgin til eftirløn **(Nýtt)**